W W W . S O S I A L U R I N . F O


# Heysttilboð til Aberdeen

Langt vikuskiftið frá hósdegi til mánadag.
Galdandi til 1. november.

Njótið eitt langt vikuskifti frá hósdegi til mánadag í Aberdeen á einum av okkara frálíku gistingarhúsum.

Patio Hotel ★★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
**Kr. 3.235,-**

Brentwood Hotel ★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
**Kr. 2.918,-**

Skene Houese Íbúðir ★★★
Fyri hvønn í íbúð
Prísir úr
**Kr. 2.600,-**

Festival Inns Hotel ★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
**Kr. 2.730,-**

Albany Guest House ★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
**Kr. 2.785,-**

**Bílegg ferðina hjá Atlantic Airways á 34 10 10, á www.atlantic.fo ella á tínari ferðaskrivstovu**

Íroknað: Flogferð við ferðaavgjøldum og innivist í 4 nætur við morgunmati.

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo

SANSIR · TEL 355 355



# Diabetes evnisdagar á apotekunum frá 5. - 7. okt. 2004

Serfrøðingur í diabetesútgerð frá Hermetico sýnir fram nýggjastu:

Blóðsukurmátarar
Insulinpennar og kanylir
Blóðtrýstmátarar
Kroppsfitimátara

Havi egið blóðsukurtól við og fái tað kannað
Mátingar: Blóðsukur, blóðtrýst, kroppsfiti
Smakkroyndir: Sukurfrí bomm

Diabetikarar og áhugaði fyri diabetes viðgerð eru hjartaliga vælkomin!

| | | |
|---|---|---|
| Tjaldurs apotek | 5.okt. | 10.00 –17:00 |
| Eysturoyar apotek | 6.okt. | 9:30 –11:00 |
| Norðoya apotek | 6.okt. | 14:00 –17:00 |
| Suðuroyar apotek | 7.okt. | 12:30 –15:00 |

APOTEKSVERKIÐ www.apotek.fo





Ov seint at spola aftur...

*Her er afturparturin á stjóranum, Heina. Tað eydnaðist Heina at sleppa undan (á)ganginum á skrivstovuni, men harvið hoyrdi hann heldur ikki ávaringina um nýmálaðu hurðina. Heini er framvegis ein ímynd av, at tað hevði loyst seg hjá honum at fingið sær og starvsfólkunum røttu trygdina alt fyri eitt.*

*Føroya Lívstrygging kann bjóða eina trygd, ið júst er grundað á avtalu millum leiðslu og starvsfólk. Skipanin eitur Virkiseftirløn og er ein skræddaraseymað loysn við bæði trygging og eftirløn.*

Virkiseftirløn er ein eftirlønarskipan við innbygdari trygging.
Virkiseftirløn er grundað á, at ein partur av lønini verður goldin inn í skipanina.
Tá ið eftirlønin verður goldin út, ræður starvsfólkið sjálvt fyri, hvussu hetta skal gerast.
Veljast kann ímillum at fáa alt goldið út í einum ella sum mánaðargjald.

Hann er stjóri

Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn · Tel 311111 · Faks 351110
heimasíða www.liv.fo · teldupostur liv@liv.fo

LÍV Føroya Lívstrygging

REPROZ




# Toyota SeaCruiser legði at í Vágsbotni

**Tey flestu kenna nokk Toyota LandCruiser, men í gjár sóu fólk á Argjum, og tey sum gingu sær ein túr í Vágsbotni, ein Toyota SeaCruiser sigla á sjónum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fíggjamorginum vóru nógv fólk savnaði við bátahylin á Argjum, fyri at síggja ein Toyota SeaCruiser koyra á sjógv og sigla yvir í Vágsbotn.

Bilurin er gjørdur sum liður í útbúgvingini hjá bilmekanikarunum á Tekniska Skúla í Havn, í fakinum "yrkislærugreinar", ið fevnir um motorar, transmissiónir, el, róðurgreiðir, karossarí, sveising, hydraulik og bremsur.

Næmingarnir, sum ganga á fyrsta skúlaári, hava sjálvir konstruerað bilin og Beinir Hansen, lærari á bildeildini, hevur staðið fyri verkætlanini.

Umleið hálvan tíma eftir at bilurin var flotaður í bátahylinum á Argjum, legði hann at í Vágsbotni. Tveir mans vóru í bilinum, og túrurin gekk av tí allar besta.

Tilsamans hevur bilurin tríggjar motorar, umframt dieselmotorin frammam hevur SeaCruisarin tveir Ford Fiesta bensinmotorar við hvør sínari skrúvu og róðrum aftan. Eisini hevur hann tvey paralell róður.

Hetta er ikki bara til stuttleika. Tað liggja nøkur disiplin í hesum, sigur Egon Øregaard, skúlastjóri á Tekniska Skúla í Havn. Hann sigur, at tey hava fylgt lesiætlan og kunngerðum, men hava bara gjørt tað upp á ein øðrvísi máta, og næmingarnir hava verið ótrúliga motiveraðir fyri hesi uppgávuni.





*Toyota SeaCruiser í bátahylinum á Argjum. Útstoytini koma upp gjøgnum motorhjálmin og ein snella er í vinstru síðu ella í bakborði. Túrurin yvir í Vágsbotn gekk av tí allar besta*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Mynd: Jens Kristian Vang*


# Feng Shui

Klaksvík 19. okt. 19.00 - 21.45
Fuglafirði 21. okt. 19.00 - 22.00
Vágunum 23. okt. 16.00 - 19.00

Er húsið á tremur..
- við gomlum klæðum, vasum, leikum, elligomlum skúlabókum, málingarestum?
- Ella við posum við klæðum "sum tú fert at gera í stand" men sum mangla bert ein knapp, lýnlás ella hava blettir?
- Hevur tú meiri klæðir at mála í, enn nakar málar?
- Ella hevði tú kunna hugsa tær at hoyrt, hvussu tú kanst seta litir saman?

Synergi
synergi.fo - synergi@synergi.fo
Tel. 22 74 64 - 22 54 02

Kom og hoyr Sigrið greiða frá, hvussu tú nuddar teg til meira orku og hvørjar litir tú skalt velja, næstu ferð tú keypir klæðir?
Einans 250,- kr.





| Lakeringar - o.a. | Verkstaður | Skaðar/Upprætting |
|---|---|---|
| · Heillakeringar | · Buglur | · Skaðar |
| · Smálutir | · Rust | · Tryggingarskaðar |
| · Eykalutir | · Sveising | · Upprættingarbonk |
| · Pletting | | |

www.BILSKROKK.fo

Slættanesgøta 9 · Fo-110 Tórshavn · Boks 2227 · Tele: +(298) 32 24 71
Faks: +(298) 31 20 71 · Fart: +(298) 21 24 71 · Email: bba@post.olivant.fo


FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

## KUNNING FRÁ FÚTASKRIVSTOVUNI UM PASS

Tann 1. oktober 2004 verður nýggja útgávan av føroyska/danska passinum tikin í nýtslu.

Nýggja passið er eitt hátøkniligt trygdarpass.

**Onki krav verður sett um umbýtan av galdandi passi!**

Av tí at nýggja passframleiðsluútgerðin er so kostnaðarmikil, er avgerð tikin um at gevast við passframleiðsluni í Føroyum, soleiðis at øll passframleiðsla verður miðsavnað í Danmark.

**Hetta ger, at møguleikin hjá fútaskrivstovuni í skundi at útskriva nýtt pass eftir 1. oktober 2004 dettur burtur.** Í staðin ber til í summum førum at framleingja verandi pass ella at fáa útflýggja "provisorisk" (fyribils) pass.

**Hetta førir eisini við sær, at passavgreiðslutíðin tá verður umleið 2 - 3 vikur.** Tí er alneyðugt, at fólk, ið hava tørv á nýggjum passi eftir 1. oktober 2004, umbiðja passið í góðari tíð.

Frá 1. oktober 2004 kunnu børn undir 15 ár ikki verða skrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum og skulu tá hava egið pass.

Mannagongdin at umbiðja pass verður hin sama sum nú. Passavgreiðslur eru á fútaskrivstovuni í Havn og á politistøðunum uttanfyri Havnina.

Upplýsingar um pass annars eru tøkar á heimasíðuni hjá politinum: www.politi.fo

M. Nepper-Christensen

Smyrilsvegur 20 Postboks 3018 FO-110 Tórshavn Tel (+298)351448 Telefax (+298) 351452